# ann undir Grønlandi



*» M/S Hjørdis« við bryggju í Fuglafirði*

føroyskum vøttum, tummilin var farin á dekki og úr vøttinum. Hann sær tummilin, har hann liggur við einari hvítari spong afturúr sær.

Hjalmar verður lagdur aftur í messuna á eina madrassu, sum lá á tveimum skottfjalum og bundin til av Theodori. Tung luft var í kahyttuni, so avrátt varð at Hjalmar varð lagdur í messuna og heitt varð á Evald Johannesen, sum var 2. meistari við Hjørdisi, at sita hjá honum. Evald hevði vakt.

## Eldur kemur í motorin

Trolið varð tikið inn, og full fer koyrd á motorin. Evald fór niður at hyggja at motorinum. Skamma stund eftir hetta kom hann upp aftur og segði frá, at eldur var í motorinum. Hann rann upp á Brúnna, boðaði frá eldsbrunanum og rópt varð út á dekkið, at eldur var í maskirúminum. Eldur var komin í luftkanalina í motorinum, og fór hann um alt maskinrúmið beinanvegin. Moturin var ein B.M.W. 420 hestar.

Hjalmar kom upp á bátadekkið í øllum góðum. Eldurin breiddi seg skjótt, og tí ráddi um at bera skjótt at. Bjargingabátarnir vórðu lyftir av bátastólinum við gilsinum, sum varð lagdur um koppin á spælinum. Tíbetur gekk motorurin á Hjørdis, so manningin fekk brúkt spælið. Spælið var reimdrivið og kundi brúkast so leingi, eldurin ikki hevði brent reimarnar. Hjalmar leyp niður í tann fyrsta bátin og kom væl undan lopinum. Evald lá ímillum bátin og eina tunnu, í tí teir settu bagborsbát á sjógvin. Hann meislaði seg eitt sindur, men slapp væl frá hesum - Tú kanst ætla, at øll keysin var næstan sum gløðandi jarn, og var hetta í evstu løtu, at teir fingu bátarnar settar á sjógvin, sigur Hjalmar.

Sum sagt hevði Steingrim Petersen 1. meistari frívakt, og lá og svav í kamarinum frammi í keysini. Evald Johannesen fór ígjøgnum royk og eld og fekk vakt mannin og so báðir útaftur. Teir vóru ikki álvuligir á at líta, tá ið teir aftur komu í ljósmála. Báðir skoldaðir um andlitið. Hetta má sigast at vera eitt satt bragd, ið Evald útinti, tí stigu teir við síðuna av ristverkinum, sum var at ganga eftir frá messuni og fram í kamarið, fóru teir í tann logandi deyðan. Eisini var tað um reppið at Hans Chr. Anthoniussen, morbróðir úr Oyndarfirði, misfórt. Hann gjørdi sum allir hinir, tá ið hann fór í bátin, men fór niðurfyri. Eiðis Hans- Hans Poulsen og Rudolf hjá Bakka Jógvan, fingu í kríllin á honum og tóku hann inn um stokkin.. Fór hann aftur við borðinum bar ikki í bøtur, tí Hjørdis hevði framskrúðu og sigldi í klingur..

Sofus í Rituvík, skiparin, segði at 10 mans skuldu í hvønn bátin. Evald hevði skrivað nøvnini á manningini á ein lepa, og krossaði nøvnin av, og fekk hetta at passa at 10 komu í hvønn bátin.Tað eydnaðist Sofusi at senda út neyðarkall bert ta einu ferðina, tí eldurin breiddi seg skjótt, at ikki vóru umstøður til enn at senda meira enn tað eina neyðarkallið. Hetta varð hoyrt - so løgið tað ljóðar- í New Foundlandi av íslendska trolarinum Þorkell Mána, sum boðaði trolaranum Egil Reyða frá hendingini. Egil Reyði, sum var eitt sindur sunnari á Fíla bank, setti beina kós ímóti vanlukkustaðnum. Eitt portugisiskt doriuskip var eisini komið á staðið. Tann fyrsti báturin róði til hetta skipið, og vóru teir allir í bátinum tiknir umborð á portugisaran.. Hjalmar kundi verið hjálptur í síni sváru støðu av lækna og sjúkrasystrum umborð á hesum skipi, men vildi ikki, sum kanska betri var. Theodor lænti neyðsendaran umborð á portugisarinum og sendi neyðarkall út.

## Egil Reyði og Viðoyggin

Knappliga síggja teir Egil Reyða koma grøvandi úr táminum, sum var um vanlukkustaðið. Hann fekk at vita, at maður var komin til skaða umborð á Hjørdis - Lat straukin koma umborð til okkara, helt skiparin á Egili Reyða fyri.

Manningin í tí fyrra bátinum varð tikin umborð á Egil Reyða, og so varð kósin sett inn til Føroyingahavnina.

Viðoyggin var eisni komin at hjálpa. Hon setti enda á Hjørdis og fór undir at sleipa. Tann seinni báturin varð bundin í gelendarin frammi á bógnum. Sofus vildi ikki fara frá skipinum. Teir høvdu 120 tons av saltfiski inni, og var hetta ein dýr last. Tá ið Svínoyggin hevði sleipað í nakrar tímar og komnir inn á Godthåbsfjørðin, sakk Hjørdis. Manningin í hesum bjargingarbátinum varð tikin umborð á Svínoynna og sett inn í Føroyingahavnina.

## Á sjúkrahúsinum

Sofus hevði boðað hospitalinum frá, at teir komu inn við manni, sum var komin til skaða. Tað tók einar seks tímar at sigla inn. Hesi boð vórðu givin, áðrenn eldur kom í Hjørdis, men sum umstøðurnar tóku seg upp, vóru teir ikki inni í Føroyingahavnini fyrr enn uml. midnáttarleitið, og stóð kvinnan eitt sindur spyrjandi, sum kom í durin, tá ið Viggo á Hædd og Hjalmar komu á gátt á sjúkrahúsinum í Føroyingahavnini. Hon var eitt sindur rísin, daman, tí teir átti at verið komnir fleiri tímar fyrr. Viggo, sum ikki var skorin fyri tungubandinum, greiddi frá tilgongdini. Hetta blíðkaði sjúkrarøktarfrøðingin. Læknin lá og svav, men varð vaktur og kom upp og tók sær væl av Hjalmari.. Hjalmar segði, at hann bleiv ikki lagdur undir fulla maskudoyving, men fekk einar tvær sproytur, so hann var "lokal bedøvaður", men hetta virkaði ikki, sum tað skuldi, og var hann seymaður og bundin til ódoyvdur, men glaður var Hjalmar, tá ið hann var undankomin vanlukkudagin 13. januar 1954.

Tá ið Hjalmar kom inn á stovuna, har hann skuldi liggja, sær hann tveir fuglfirðingar. Tað vóru Grias og Fredag, sum høvdu fingið hald í ryggin og vórðu innlagdir. Tað var hugaligt at møta tveimum fuglfirðingum, tá ið teir so brosmubardir komu aftur at landi frá hesum skaðatilburði. Evald kom eisini undir læknahond samtíðis sum Hjalmar. Hann hevði skoldað andlitið og meltað síðuna, men tók tað seg væl upp.



*Evald Johannesen var 2. meistari hendan vanlukkur túrin við »M/S Hjørdis«*

Steingrim var við tí seinra bátinum, og kom hann á sjúkrahúsið væl seinni enn hinir. Sama kvinna setti knyglar í brýr og fýsti at honum, hví hann ikki var komin saman við hinum? Hetta danska sprund fekk søguna sagda einaferð afturat. Hon blíðkaðist, og var Steingrim væl havdur av lækna og sjúkrasystrum.

Læknin segði við teir, at um einar 14 dagar, so fer ein týskur dampari til Føroya, sum eitur Ehrenfält. Fleiri av manningini fóru heim við hesum skipi. Ehrenfält var komin við agni og frystigóðsi til Føroyingahavnina, og var manningin á Hjørdis við at lossa henda farm.

Vert er at nevna, at Piddi leigaði sluppini Vestmanna hetta heystið, so manningin kundi fara á sild.

Eg var 10 ára gamal, tá ið henda hending fór fram, men eg má siga at pápi (Theodor) segði lítið um hetta. Vit fingu eitt fjarrit úr Grønlandi henda dag 13. juni 1954: Alt væl, heilsan Theodor. Pápi fór til Íslands og silgdi út frá Flatoyri við trolarinum Gyllir og var við trolaranum Jón Baldvinssyni, tá ið hesin fórt á Reykjanesi, hugsi tað var 1957. Tá fingu vit eisini eitt fjarrit: Alt væl, heilsan Theodor.

Hjartaliga tillukku við sjeytifimm ára degnum!